# Goymsluleiðari

Til umsiting av goymslu okkara søkja vit eftir fólki at byrja skjótast til ber.

**Starvsøkið:**
Sum goymsluleiðari hevur tú ábyrgdina og dagliga raksturin av goymsluni, við hesum vørumóttøku og –útflýggjan, vørumerking, goymsluuppgerð v.m. Eisini kemur tú at standa fyri menning og betran av mannagongdum í.s.v. goymslustýring. Onnur ábyrgdarøki eru eisini knýtt at starvinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við sølu- og tænastudeildir okkara, her undir eisini Farodane City og Casa.

**Førleikakrøv:**
Umframt hollan kunnleika og/ella starvsroyndir innan goymsluøkið vænta vit at tú:

- ert álítandi, ábyrgdarfull/ur og ágrýtin
- tolir arbeiðstrýst og stundum skiftandi arbeiðstíðir
- ert tænastusinnað/ur, skipað/ur og skyldurøkin
- hevur góð samstarvsevni
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur koyrikort, við fyrimuni stóra koyrikortið og trukkføraraprógv

**Á Farodane bjóða vit tær:**
Eitt avbjóðandi, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult starv í eini eldri, men nútímans fyritøku í stórari menning. Saman við 50 starvsfeløgum kemur tú at mynda landsins fremsta skrivstovuveitara, har vit gjøgnum álit, ábyrgd og áræði hava sum aðalstevnumið at vera sjálvsagdi samstarvsfelagin.

Sært tú teg sjálvan sum part av hesum, frætta vit fegin frá tær. Ynskir tú at hoyra nærri um starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við starvsfólkadeildina. Løn í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan mánadagin **18. september 2006** og stílast til:

Farodane P/F
Starvsfólkadeildin
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn

**FARODANE**

Brekkutún 4 Postboks 109 FO-110 Tórshavn Tlf: 311414 farodane@farodane.fo www.farodane.fo

*Farodane P/f er 56 ára gomul handils- og tænastufyritøka, sum í dag er millum fremstu heildarveitarar til skrivstovuna. Umframt høvuðsvirksemið innan sølu og tænastu av KT-loysnum reka vit skrivstovumarknaðin Farodane City, møblasøluna Farodane Casa, umframt skeiðstovuna Kvasir.*


# Kunngerð

## Um broyting av Býarplaninum fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi **31/08-06** hevur samtykt at gera broytingar í býarplaninum í Runavík og á Skála.

**Runavík**
Broytingin í Runavík umfatar nýtt **B-øki** á matr. nr. 51 sunnan fyri matr. nr. 54 og 55 og nýtt **C4-øki** á matr. nr. 51 sunnan fyri matr. nr. 44 í Runavík.

**Skála**
Broytingin á Skála umfatar nýtt **B-øki** á C4-øki og E1-øki vestan fyri Sambýli, og umfatar broytingin hesar matriklar:
34a, 42a, 62a, 75a, 76a, 77a, 80, 82, 85a, 86, 87a, 91a, 92a, 94, 116a, 117a, 120a, 121a, 123a, 125a, 126a, 128a, 132a, 133a, 135a, 141a, 144, 148, 300a, 315a, 335, 336, 337a, 341, 342, 343, 399, 401, 402, 403, 404, 425, 544a, 545 og 621.

Broytingarnar eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 12. september til og við 3. oktober 2006.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 12. december 2006.

Saltangará, tann 8/09-2006
**Runavíkar býráð**

RUNAVÍKAR KOMMUNA.


FARODE LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Sosialurin

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo



Lesið
Sosialin
-tað
loysir
seg


# Hondbóltsvenjari

Søkt verður eftir hondbóltsvenjara til barna- og ungdómsdeildirnar hjá Eiðis Bóltfelag veturin 06/07.

**Nærri fæst at vita við at venda sær til Eiðis Bóltfelag á tlf. 262151 ella 258364.**

# Læknaskrivari

1 starv sum læknaskrivari 3/4 tíð er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving sum læknaskrivari ella annar líknandi førleiki
- Teldukunnleiki á basalum støði
- Fyrikomandi

**Løn:**
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja er úti 24. september 2006. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til viðtaluna á tlf. 313700. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum kunnu sendast til:

**Kommunulækni Kári Jacobsen**
**J. Paturssonargøta 22**
**FO-100 Tórshavn**

